Felagið fyri lesi- og skriviveik
MBF-Húsið - Íslandsvegur 10c
Endamál felagsins er at hjálpa teimum við hava lesi- og skrivitrupulleikar. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

Felagið fyri Hoyribrekað í Føroyum
MBF Húsið Íslandsvegur 10c, FO-100 Tórshavn
E-Mail: hoyr@post.olivant.fo
Heimasíða: www.hoyr.fo
Formaður: 215497 E-mail: jakdan@post.olivant.fo
Næstformaður: 421092 - 281179 E-mail: pouloeregaard@hotmail.com
Kassameistari: 319588 - 212839 E-mail: marjunhansen@hotmail.com

Føroya Felag Móti Krabbameini
Grønlandsvegur 58, Tórshavn
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15. Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

Kedron, Vágar
Møtir og tiltøk hjá samkomuni eru at síggja á heimasíðu okkara. Øll eru hjartaliga vælkomin í KEDRON til okkara møtir og tiltøk.
Vitja heimasíðu okkara fyri at síggja hesi. www.kedron.fo
Hevur tú ikki hendan møguleikan, kunna tygum ogna tygum KEDRON-tíðindi.
Verið hjartaliga vælkomin.

Vága Pensionistafelag
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Sofíu Haraldsen, tlf. 332741 ella ein av nevndarlimunum.

Amnesty International Føroya Deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 9.00 til 17.00 og mikudag frá kl. 9.00 til 16.00
www.amnesty.fo
amnesty@amnesty.fo

Heilafelagið, felagið fyri apopleksi- og afasirakt
Tlf. 321520 · t-postur: heilaf@post.olivant.fo

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn.
tlf. 319630/61 655400.

Rúslinjan hjá Bláa Krossi
Rúslinjan hjá Bláa Krossi, tlf. 318586, svarar fríggja-, leygar- og sunnukvøld kl. 20 - 24.

Opin ACA-fundur Tinghúsvegur 37, Havn
(Tilkomin hjá alkoholikarum og vantrivnaður, dysfunktionellum, familjum). Leygardag kl. 11.00-12.00 á Tinghúsvegi 37 í Havn.

AA-fundir í Havn
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00.
Leygardag: kl. 22.30-23.30 AA-fundur.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

AA-fundir (Big book meeting)
Týsdag: kl. 20.00 Stóri bókafundur er hvørt týskvøld í Losjuni á Tinghúsvegi 18. Inngongd frá Bøkjarabrekku.

Al-Anon
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt mikukvøld kl. 20 og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

AA-fundir í Vestmanna
Í Skótahúsunum
Hósdag kl. 20 AA-fundur.
Sunnudag kl. 17 AA-fundur (opin fundur).

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

Al-Anon
fundur fyri avvarðandi at alkaholikkara er hvørt týskvøld kl. 21, á Mýruvegi 22.

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA fundir á Tvøroyri (í gomlu læknamiðstøðini)
Sunnudag kl. 15
AA fundur (opin fundur seinasta sunnudag í hvørjum mánaða)
Hóskvøld kl. 19
AA- into- action- fundur (fundurin er opin)

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

MERKISDAGAR

60 ára føðingardagur
Fríggjadagin 21. august verður Símun Joen-Jacobsen, Sandavágur, 60 ár. Opið hús verður heima frá kl. 19.

60 ára føðingardagur
Leygardagin 29. august heldur Heri Nolsøe 60 ára føðingardag. Opið hús verður í HB-húsinum við brunch frá kl. 10-15.

60 ára føðingardagur
Leygardagin 12. september fyllir Jytta Juul, Funningur, 60 ár. Vælkomst verður í Eydnuni á Oyrabakka 12. september frá kl. 19.

67 og 70 ára føðingardagur
Mánadagin 14. sept. hava Kristina og Petur Mortensen 67 og 70 ára føðingardag. Dagurin verður hildin í húsinum hjá Starvsmannafelagnum, J.H Schrøtersgøta 9. leygardagin 12. sept. Føðingardagurin er frá kl. 12 til kl. 17. Tey sum ynskja at halda dagin saman við okkum, eru vælkomin at boða frá á tel: 316530 ella 516530 áðrenn mánadagin 7. sept.

75 ára føðingardagur
Ónsdagin 26. august verður Kristina Bech, Porkeri 75 ár. Føðingadagurin verður hildin í heiminum á Bakkafløtti frá kl. 17.

80 ára føðingardagur
Mánadagin 24. August verður Jolina Bech Porkeri 80 ár. Dagurin verður hildin saman við børnum og svigerbørnum

85 ára føðingardagur
Hósdagin 20. august fyllir Anna Maria Davidsen, vanliga nevnd Mia, 85 ár. Dagurin verður hildin á Ellisheiminum í Runavík frá kl. 17.

85 ára føðingardagur
Leygardagin 22. august verður Jens Jacob í Hjøllum 85 ár. Føðingardagurin verður hildin saman við familjuni. Kl. 20-22 eru øll vælkomin at heilsa uppá føðingardagsbarnið á Gjáargarði.

90 ára føðingardagur
Leygardagin 22. august fyllur Petur Alfred Klein, Fuglafjørður 90 ár. Opið hús verður í Lonuni frá kl 16 og úteftir. Øll eru hjartaliga vælkomin

95 ára føðingardagur
Fríggjadagin 21. august verður Josefina Thomsen av Økrum 95 ár. Tey, ið hava hug at heilsa upp á Josefinu eru vælkomin á Ellis- og Røktarheimið á Tvøroyri millum kl. 15-18.

Silvurbrúdleyp
Týsdagin 8. sept. hava hjúnini Kirstin og Helgi Djurhuus í Havn verið gift í 25 ár. Veitsla verður hildin í B36 húsinum leygarkvøldið 12. sept. kl. 19. Tey, ið vilja hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá á tlf. 217254 (Kirstin) ella eftir kl. 18, 317054 (heima) innan 30. aug.

Silvurbrúdleyp
Mánadagin 28. sept. hava hjúnini Súsanna og Tórolvur Joensen, Leirvík, silvurbrúdleyp. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík leygarkvøldið 26. sept. kl. 18.30. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin at siga frá á tlf. 443332 og 213332 ella tj@olivant.fo innan 12. sept.

Brúdleyp
Hósdagin 20. august giftast í Fríðrikskirkjuni á Toftum Hertha Ólavsdóttir Magnussen av Nesi og Bergur Johannesen av Argjum. Klokkan 20.30 verður køkuveitsla í missiónshúsinum á Toftum, Tabor. Øll eru hjartaliga vælkomin

Brúdleyp
Leygardagin 22. august kl. 14 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík, Oda Ellingsgaard, Saltangará og Meinhard Mikladal, Klaksvík. Veitslan verður fyri innbodnum í Mentanarhúsinum í Fuglafirði kl. 19.

Brúdleyp
Leygardagin 22. august giftast Maiken Jacobsen og Brian Joensen Norðragøta. Vígslan verður kl. 15 í Gøtu kirkju. Veitslan verður fyri innbodnum. í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.

Brúdleyp
Leygardagin 29. august kl. 15 giftast í Vesturkirkjuni Súsanna Jacobsen og Hávarður í Stórustovu, Argir. Døgurði verður fyri innboðin á Hotel Føroyum kl. 18.30

Brúdleyp
Leygardagin 5. september giftast Jóhanna Christiansen, Søldarfjørður, og Kriistian Mikkjalsson Joensen, Klaksvík. Vígslan verður í Elim í Søldarfirði kl. 15 og veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at tekna seg á tlf: 288953 ella 216858 áðrenn 22. august.

Brúdleyp
Leygardagin 19. september kl. 14 giftast í Hovs kirkju Selinda Hovsgarð, Hov, og Thorstein Thomsen, Hvalba. Veitslan verður hildin í Roynhøllini í Hvalba kl. 19. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða biðin um at tekna seg á tlf. 375445, 575445 (Selinda) ella 222899 (Amy) áðrenn 1. september.

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Alt til akfør	❑ Amboð
❑ Arbeiði	❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð
❑ Bátaútgerð	❑ Bingo	❑ Brævaskifti
❑ Burturm./funnið	❑ Býli	❑ Býli uttanlands
❑ Bøkur	❑ Dansur	❑ Dýr
❑ Fartelefonir	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súkklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl 12.00 dagin fyri útgávudagin, t.v.s. at lýsingin til mánadagsblaðið skal vera okkum í hendi fríggjadag á middegi.
Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.
Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

Sosialurin
Heilsanir
kr. 30,-

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 1 dag fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Mán. ❑ Týs. ❑ Mik. ❑ Hós. ❑ Frí.

Tekstur:

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn:
Bústaður:
Bygd/býur: Tlf.:

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: **>>Heilsanir<<**